# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ikki nóg mikið at spyrja USA

Myndugleikar í USA eiga at lata donsku stjórnini eina frágreiðing, eftir at nýggjar upplýsingar eru komnar fram um møguligan fangaflutning í loftrúminum hjá Ríkisfelagsskapinum. Hetta er støðan hjá øðrum tí føroyska fólkatingsumboð Føroya. Upplýsingar um, at CIA hevur staðið fyri fangaflutningi í grønlendskum loftrúmi eru bornar fram í dokumentarsendingin hjá Danmarks Radio, og gjørdu vit her okkara viðmerkingar til hesi tíðindi. Vit eftirlýstu samstundis støðuna hjá føroysku fólkatingsumboðunum til hetta sera álvarsliga mál. Nú er Edmund Joensen, fólkatingsmaður Sambandsfloksins so komin út við sínari støðu, tað er at fegnast um. Edmund Joensen sigur í tíðindaskrivi, at upplýsingarnar í sendingini mugu takast í størsta álvara. Men hvat hevur Edmund so gjørt við málið? Hvørji politisk stig hevur hann tikið? Jú, hann hevur vent sær til danska uttanríkisráðharran, sum hevur vissað hann um, at danska stjórnin nú fer at hyggja nærri at upplýsingunum í nevndu dokumentarsending. Stjórnin fer um neyðugt eisini at seta seg í samband við amerikanskar myndugleikar til tess at greiða ivamál. Víðari sigur Edmund Joensen, at tað er rætt og rímiligt, at stjórnin fær høvi at ganga ígjøgnum nýggju upplýsingarnar og at fáa svar frá amerikonskum myndugleikum. Serliga umráðandi er at tryggja, at loftrúmið hjá ríkisfelagsskapinum, herundir føroyskt loftrúm, ikki verður brúkt til ólógligan flutning av fangum. Sum fólkatingsmaður leggur Edmund Joensen stóran dent á, at loftrúmið hjá Ríkisfelagsskapinum, herundir føroyskt loftrúm, ikki verður brúkt til endamál, ið stríða ímóti fólkarættinum ella við tí fyri eyga at bróta mannarættindi. Hetta er ein púra greið støða, sum er alla æru verd.

Hetta hevði fyri so vítt verið alt gott og væl, men spurningurin er bara, um hetta er nóg mikið. Longu í gjárkvøldið komu aftur nýggjar upplýsingarfram, sum avdúkaðu, at CIA flogfør eisini hava millumlent á flogvøllinum í Kastrup. Hvat verður tað næsta? spyr ein alt meira undrandi danskur almenningur. Her ruggar ikki alt rætt! Tað er tíverri nógv, sum bendir á, at her er onkur, sum ikki hevur sagt allan sannleikan. Danska stjórnin hevur jú áður fingið sama spurning, sum Edmund nú hevur sett henni. Svarið var: USA sigur, at einki er í øllum hesum. Nú er so avdúkað, at USA hevur sagt ósatt um fangaflutningin, sagt ósatt fyri øllum teimum stjórnum, sum áður hava spurt til málið, eitt nú donsku og týsku stjórnunum. Hvørja vissu hava vit fyri, at USA nú fer at siga sannleikan fyri Per Stig Møller? Als onga! Her má sostatt annað og meira til. Eydnast tað ikki andstøðuni í fólkatinginum at noyða stjórnina at fremja eina óhefta serfrøðingakanning, eiga Føroyar, møgiliga saman við Grønlandi at gera sína egnu kanning. Hetta ber væl til, og vit hava fólk við neyðugum førleikum til hesa uppgávu. At enda fara vit at lýsa eftir støðuni hjá hinum fólkatingsumboðnum. Hvat ger Høgni Hoydal við hetta mál? Hvørja støðu hevur hann, tá málið kemur upp á fólkatingi í næstu viku?

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gudi - Ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN

*Níggjundi partur*

Elisa profetur. Vit lesa um hann í kongabókunum. Frá 19. kapitli í fyrru kongab. Til 13. kap. í seinru kongab. Hann gjørdi, við Gudi, mong undurverk, tey ber til at lesa um í omanfyri nevnda skriftbroti. Hann reisti enntá ein ungan mann upp frá deyðun við bøn

Ein søgan er nokso vælkend, tá árameiski herhøvdingin Na´aman kom til hansara fyri at søkja sær hjálp fyri spitalskusjúku sína. Søgan er áhugaverd og lærurík, sum alt í bíbliuni.

Áramearar høvdu herja í Ísrael og tikið eina smágentu til fanga. Hendan smágentan kom í hús Na´amans at tæna. Har sigur hon frá profetinum í Ísrael, og helt við matmóður sína, at hevði harri hennara farið til hansara, so hevði hann fingið hjálp. Tað bleiv so til tað, at Na´aman fór at royna hetta. Na´aman kom tá, við vagni og hestum sínum, til hús Elisa og steðgaði uttanfyri. Men hvat hendir, Elisa sendi bert onkran annan út at siga við Na´aman um at fara til Jordan og baða sær sjey ferðir. Hetta var ovboði fyri henda mæta herhøvdinga, hann gjørdist spruttfornermaður og fór at tosa um, hvussu hann hevði hugsa sær, at hetta fór at ganga fyri seg og rýmdi avstað í vreiði. Sum um áirnar við Damaskus, Abana og Parpar, ikki vóru nógv betri enn øll vøtn í Ísrael. Tænarar Na´amans fingu tó yvirtalað hann til at royna ráðini hjá profetinum. Hann fór sjey ferðir undir í Jordan, og tá ið hann kom uppaftur sjeyndu ferðina, var likam hansara sum á smábarni.

Hetta lærir okkum nógv. Fyrst hvat ein lítil vitnisburur, enntá av einum smábarni, kann gera. Fyri tað næsta, hvat lýdni avrikar, hóast trúgvin er veik. Maðurin fór ógvuliga ivandi niður í vatnið, men lýdni bjargaði honum. “Tann, ið trýr á Sonin, hevur ævigt lív; men tann, ið ikki vil lýða Sonin, skal ikki síggja lívið; nei, vreiði Guds verður verandi yvir honum.” Jóh. Ev. 3,36. Fyri tað triðja lærir hetta okkum viðvíkjandi trúnni á Gud. Hesin maðurin ásannaði at Ísraels Gud er hin sanni Gud:

So vendi hann við aftur til gudsmannin við øllum fylgi sínum, og táið hann var komin hagar, steig hann fram fyri hann og segði: "Nú veit eg, at eingin Gud er á allari jørðini uttan í Ísrael! Tak tí nú við gávu frá tænara tínum 2. kongab. 5,15.

Gud hevur gjøgnum øldirnar talað ógvuliga greitt við profetum sínum, og hevur staðfest orðið við teknunum, sum hava fylgt við. Til endan hevur hann talað við Syni sínum soleiðis, sum Hebrearabrævið 1,1 sigur okkum.

Jesus sigur í Jóh. Ev. 14,11 soleiðis:

Trúgvið Mær, at Eg eri í Faðirinum, og Faðirin er í Mær! - Og um ikki, so latið verkini sjálv fáa tykkum at trúgva Mær!

Og í 5,36.

Men Eg havi tann vitnisburð, sum er størri enn tann, ið Jóhannes bar; tí verkini, ið Faðirin hevur givið Mær at fullføra - júst hesi verk, ið Eg geri - vitna um Meg, at Faðirin hevur sent Meg.

Bíblian er full av undurverkum, sum prógva, at Gud stendur aftanfyri orð sítt.

***Framhald***

## Dansikvøld í Margarinfabrikini

Leygarkvøldið 2. februar frá kl. 19-22 verður dansikvøld fyri øll børn í Føroyum 3. - 7. flokk í Margarinfabrikkini í Havn.

Ymiskt stuttligt undirhald verður alt kvøldið. Vit fara at dansa stoppdans, ballóndans, limbo og mangt annað.

Dj Olli 2006 fer at spæla feitan tónleik, og genturnar hjá Meylu koma at framføra.

Gestalærarin Sebastian kemur eisini at læra børnini ymiskar dansir, so tað er bara at koma oman til eitt super stuttligt dansikvøld, sigur Margarinfabrikkin í tíðindaskrivi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.